## Tvey uppskot til forseta

Tað stendur ikki á at fáa uppskot til forsetaembætið í Italia, nú Carlo Ciampi hevur kunngjørt, at hann leggur frá sær fyri aldur seinni í hesum mánaðinum. Ciampi er 85 ára gamal.

Nývaldi forsætisráðharrin, Romano Prodi, hevur skotið upp, at ein av floksfeløgum hansara, Massimo D'Alema, skal taka við sum forseti, og í gjár kunngjørdi fráfarandi forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, at hann hevur eisini eitt uppskot. Hann mælir til at velja floksfelagan Gianni Letta til forseta.

Bæði høgra- og vinstravongurin í Italia hava mælt Carlo Ciampi til at halda fram í embætinum, men í gjár segði hann, at hóast hann er takksamur fyri álitið, heldur hann seg ikki hava ta neyðugu orkuna til at røkja embætið.

Ætlandi skal tjóðartingið velja nýggjan forseta mánadagin í næstu viku.

## Leggur frá sær

Í Serbia hevur Miroljub Labus, varaforsætisráðharri, gjørt av at leggja frá sær fyri á tann hátt at mótmæla, at Serbia hevur ikki útflýggjað generalin Ratko Mladic, sum er skuldsettur fyri grov krígsbrotsverk í borgarakrígnum í Bosnia í nítiárunum.

Serbia vil fegið sleppa upp í ES. Partarnir hava tingast leingi, og Miroljub Labus hevur verið samráðingarleiðari hjá serbisku stjórnini. Men ES kravdi, at serbar skuldu útflýggja Ratko Mladic innan 30. apríl. Bleiv tað ikki gjørt, fór ES at slíta samráðingarnar við Serbia. Mladic bleiv ikki útflýggjaður, og ES hevur nú steðgað samráðingunum.

– Stjórnin hevur svikið tey týdningarmestu áhugamálini hjá landinum og fólkinum við at lata Ratko Mladic ganga leysan, skrivar Miroljub Labus í uppsagnarbrævi sínum til Bojislav Kostunica, forsætisráðharra.

Høvuðsákærin í krígsbrotsmannadómstólinum fyri ganla Jugoslavia, Carle del Ponte, hevur fyrr lagt serbisku myndugleikarnar at halda hondina yvir Ratko Mladic.

## Færri børn arbeiða

Fyri fyrstu ferð minkar talið á børnum, ið verða send á arbeiðsmarknaðin at arbeiða, og tølini vísa, at tað eru serliga tey yngru børnini, sum sleppa frá at fara til arbeiðis.

Tølini, sum altjóða arbeiðarafelagsskapurin ILO hevur kunngjørt, vísa, at frá 2002 til 2004 minkaði talið á børnum á arbeiðsmarknaðinum 11 prosent. Har sæst eisini, at talið á børnum ímillum fimm og 14 ár, sum arbeiddu, minkaði heili 33 prosent.

Aðalskrivarin í ILO, Juan Somavia, sigur við AP, at heldur gongdin fram, verða eingi børn á arbeiðsmarknaðinum um eini tíggju ár. Men kortini er langt á mál, tí sambært ILO eru tað framvegis 218 milliónir børn, sum verða koyrd á arbeiðsmarknaðin.

## Børnini bíða



*Bretar bíða ov leingi við at fáa sær børn.*

Ein bretsk kanning vísir, at bretar bíða leingi við at fáa sær børn, og at tey, sum eru fødd í sjeytiárunum, vilja sleppa at njóta lívið, áðrenn tey binda seg at børnum, skrivar blaðið The Guardian.

Kanningin hjá blaðnum vísir, at 61 prosent av monnunum og 51 prosent av kvinnunum halda, at tað hevur størri týdning at njóta lívið enn at fáa sær børn:

Allan Pacey á lærda háskúlanum í Sheffield sigur við The Guardian, at tað er skeivt av fólki at bíða við at fáa sær børn. Hann vísir á, at kvinnur fáa størri trupulleikar við at gerast við barn, tá tær koma upp í 35 ára aldur, og tað sama er galdandi fyri menninar, tá teir fara um tey 40, sigur hann.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Eiga at gloyma gølurnar



*Tony Bleir: – Gloymið gølurnar og minnist heldur avrikini.*

**Tony Blair, forsætisráðharri, vil hava bretsku veljararnar at gloyma gølurnar hjá summum ráðharrum, nú lokalval er í dag.**

BRETLAND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

–Yvirskriftirnar frá nýggju døgum eiga ikki at fjala tað, sum vit hava fingið av skafti seinastu nýggju árini, sigur Tony Blair ávarandi í einari roynd at fáa veljararnar at gloyma gølurnar um John Precsott, varaforsætisráðharra og Charles Clarke, innanríkisráðharra. Í dag er lokalval í Bretlandi, og Blair stúrir fyri, at tær báðar gølurnar kunnu kosta Labour dýrt.

Gølan um Charles Clarke kyknaði, tá tað kom fram, at 1.023 útlendskir fangar eru slopnir úr bretskum fongslum seinastu sjey árini, uttan at myndugleikarnir yvirhøvur hava umhugsað at koyra teir av landinum. Tað er komið fram, at fleiri av útlendingunum sótu í fongsli fyri morð, neyðtøku og rán.

John Prescott noyddist herfyri at viðganga, at hann hevði verið konu síni ótrúgvur, og at hann hevði havt dekan ov gott samband við skrivara sín, Tracy Temple.

Bløðini hava gjørt nógv burtur úr teimum báðum gølunum, og Blair ber ótta fyri, at tær kunnu skaða flokkin. Sjálvur hevur hann trupulleikar av, at hann er lagdur undir at geva monnum aðalsheiti, aftur fyri at teir hava veitt flokki hansara pengar ella lán.

Spurningurin er nú, hvat veljararnir siga.

# »Eg vann, Amerika tapti«

**Zacharias Moussaoui fekk lívlangt fongsul fyri sín lut í atsóknunum 11. september í 2001.**

DÓMUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Zacharias Moussaoui fekk lívlangt fongsul.*

Við frmstafingi og longutong vísandi sigursteknið tók Zacharias Moussaoui ímóti dóminum frá nevningunum.

– Tit taptu, Amerika, eg vann, rópti hann, tá hann hevði fingið at vita, at hann slapp undan deyðarevsing, men at hann skal sita í fingsli tað, sum eftir er av lívi hansara. Ákæruvaldið hevði kravt deyðarevsing, men teir nýggju nevningarnir kundu ikki semjast um kravið og samdust tí um lívlangt fongsul.

Tann ákærdi lat ikki við seg koma, meðan dómurin bleiv lisin upp. Í rættarhølinum vóru eisini avvarðandi hjá nøkrum teirra, sum doyðu 11. september í 2001, men heldur ikki tey lótu við seg koma.

– Dómurin staðfestir endan á hesum rættarmálinum, men ikki á bardaganum ímóti yvirgangi, segði George W. Bush, forseti, tá hann frætti um dómin.

Tann 37 ára gamli Zacharias Moussaoui skuldi taka lut í yvirgangsatsóknunum at New York og Washington, men hann bleiv tikin, áðrenn atsóknirnar vórðu settar í verk. Tá hevði hann verið til venjingar at flúgva eitt ferðamannaflogfar, tí eftir ætlanini skuldu hann og aðrir ræna eitt flogfar og stoyta tað niður í Hvítu Húsini.

Moussaoui, sum er franskur ríkisborgari av marokkanskum uppruna, er tann einasti í USA, sum er ákærdur í sambandi við atsóknirnar at World Trade Center og Pentagon, ið kostaðu næstan 3.000 mannalív.